UTTAN ÚR HEIMI

## Óttast yvirgang í føstuni

Muslimski føstumánaðurin, ramadan, byrjaði í gjár, og í fleiri londum stúra myndugleikarnir fyri, at yvirgangsbólkar fara at misbrúka føstuna til atsóknir.

Í Egyptalandi hevur løgreglan fingið boð um at standa tilbúgvin, sjálvt um myndugleikarnir royna at vissa útlendsk ferðafólk um, at teir hava ikki fingið nakra ábending um komandi atsóknir. Ísraelsku myndugleikarnir hava kortini mælt sínum ríkisborgarum frá at fara til tey væl umtóktu frítíðarstøðini í Sinai, skrivar AP.

Tey bæði seinastu árini hevur muslimski føstumánaðurin verið blóðugur. Ein orsøk er, at summir víðgongdir muslimar halda seg fáa eitt serliga gott umdømi, um teir lata lív í einari halgari søk í føstumánaðinum. Søgnin sigur eisini, at Muhammed og hansara menn vunnu fleiri sigrar á teimum vantrúgvandi í føstumánaðinum, sum er tann seinasti og tann mest halgi av teimum níggju mánaðunum í tí islamska árinum.

## Leita eftir burturfluttari kvinnu

Skyldfólk hjá einari burturfluttari kvinnu í Kolombia gera nú eina roynd at fáa at vita, um hon framvegis er á lívi.

Aida Botero de Duvaltier varð rænd og burturflutt í mars í 2001, og síðani hevur eingin hoyrt nakað frá henni. Tað var Fólksins Frælsisherur, sum burturflutti hana, og skyldfólkini hava seinni goldið burturflytarunum loysigjald, men Aida er ongantíð komin afturíaftur.

Nú um dagarnar slepti eitt flogfar 50.000 flogseðlum niður yvir økið, har kvinnan varð burturflutt. Á flogseðlunum verða fólk biðin um at seta seg í samband við skyldfólkini ella myndugleikarnar, um tey vita nakað um ta burturfluttu kvinnuna. Tey avvarðandi viðganga kortini, at tey hava smáar vónir um, at Aida er á lívi longur.

## Brúka eiturevni til bananir

Kanningar hjá einum svenskum umhvørvisfelagsskapi hava avdúkað, at bananir av kendum sløgum so sum Chiquita, Dole og Del Monte verða javnan sprændar við evnafrøðiligum evnum.

Kanningin avdúkar, at teir, sum dyrka bananirnar, brúka umleið tíggju ferðir so nógv eiturevni sum teir, ið dyrka eplir. Tað hevur eisini víst seg, at í Honduras og Costa Rica er krabbamein nógv vanligari ímillum fólk, sum arbeiða í bananplantasjunum enn ímillum teirra, sum arbeiða í aðrari vinnu.

Svenski umhvørvisfelagsskapurin staðfesti longu í 1996, at bananplantasjurnar brúktu alt ov nógv eiturevni, og ein nýggj kanning vísir, at skilið er tað sama í dag, skrivar Aftenposten.

Tann nýggja kanningin vísir, at lantssjurnar eru givnar at brúka summi evni, sum eru serliga vandamikil, men tað er ikki nóg mikið, sigur tann svenski felagsskapurin. Í einum opnum brævi heitir hann á Chiquita, Dole og Del Monte um at gevast við at brúka eiturevni yvirhøvur í plantasjunum.

## Russararnir koma

Fyri fyrstu ferð skulu russiskir hermenn taka lut í einari hernaðarvenjing í Svøríki, skrivar Aftonbladet.

Mánadagin var svenski verjumálaráðharrin, Leni Björklund, í Moskva og tingaðist við russiska verjumálaráðharran, Sergej Imanov, og úrslitið av tingingunum var, at ein russisk herdeild verður við í einari altjóða venjing, sum verður í Norðursvøríki í januar, og sum hevur fingið heitið "Kavaflykrur".

Á fundinum samdust ráðharrarnir eisini um at skipa fyri einari felags herflotavenjing í Eystrasalti, men tað er ikki avgjørt, nær hon verður. Svenski verjumálaráðharrin segði aftan á fundin, at endamálið við herflotavenjingini er at fáa staðfest, hvussu ein best kann bjarga manningini á einum kavbáti, sum søkkur niður á botn.



*Tað fer at taka mánaðir at rudda New Orleans. Hendan myndin varð tikin mánadagin*

# USA kann vænta fleiri ódnir afturat í ár

**Samstundis sum bjargingarliðini eru givin at leita eftir fólki í New Orleans, boða veðurmenninir frá, at roknast kann við tveimum ringum ódnum afturat í ár**

VEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Myndugleikarnir í Louisiana kunngjørdu í gjár, at bjargingarliðini eru givin at leita eftir fólki í New Orleans. Higartil er staðfest, at ódnin "Katrina" kravdi 964 mannalív í Louisiana, og í grannastatinum Mississippi hava bjargingarliðini funnið 221 deyð. Sostatt kravdi "Katrina" 1.185 mannalív í teimum báðum statunum.

Býarmyndugleikarnir í New Orleans siga, at bjargingarliðini hava kannað 23.000 hús í býnum, og at fleiri av teimum deyðu lógu uppi á loftinum ella uppi á hanaloftinum, har tey ivaleyst høvdu leitað sær skjól undan tí nógva vatninum.

Amerikanskir veðurmenn ávara nú um, at amerikanarar kunnu vænta í hvussu er tvær ringar ódnir afturat í ár. William Gray, sum arbeiðir á lærda háskúlanum í Colorado, og sum hevur drúgvar royndir innan veðurfrøði, sigur við Reuters, at roknast kann við trimum tropiskum stormum afturat í ár, og at tveir teirra fara at menna seg til ódn. Heldur meting hansara, verða teir tropisku stormarnir 21 í tali í ár, og tað er tað mesta síðani 1933.

William Gray sigur, at onnur ódnin verður rættiliga ring við vindmegi upp í einar 180 kilometrar um tíman.

Higartil hava fimm serliga ringar ódnir herjað økini við Karibiska Havið og Meksikanska Flógvan, og tað er tvær ferðir meiri enn vanligt, skrivar Reuters. Vanliga koma umleið tíggju tropiskir stormar úttan úr Atlantshavinum, seks plaga at menna seg til ódn, og av teimum plaga tvær at vera serliga ringar.

Tropiski stormurin "Stan" hevur júst gjørt um seg í miðamerikonsku londunum El Salvador, Guatemala og Honduras. Myndugleikarnir í El Salvador kunngjørdu í gjár, at har hevur illveðrið kostað 31 mannalív, í Guatemala eru fýra deyð, og illveðrið kravdi eisini fýra mannalív í Honduras.

Mitt undir illveðrinum fór gosfjallið Santa Ana í El Slavador at goysa. Tvey fólk doyðu, og umleið 2.000 máttu flytast burtur frá gosfjallinum, sum er einar 70 kilometrar vestan fyri høvuðsstaðin San Salvador.

# Stórt læknatrot í Danmark

**Um 20 ár verður tørvur á næstan 1.500 læknum í Danmark**

LÆKNATROT
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tey seinastu árini hava teir lærdu háskúlarnir í Danmark tikið ímóti nógvum norðmonnum og svium, sum vilja sleppa at læra til lækna, og tað hevur havt við sær, at í dag eru 20 prosent av teimum læknalesandi í Danmark norðmenn og sviar.

Ein orsøk er, at tað er tørvur á læknum í Danmark, og tí hava myndugleikarnir vónað, at fleiri av teimum norsku og svensku læknalesandi velja at verða verandi í Danmark eftir lokna útbúgving.

Danska heilsustýrið hevur mett, at 80 prosent av teimum norsku og svensku læknunum velja at arbeiða í Danmark, men nú vísa tøl hjá svenska heilsustýrinum, at myndin er beint tann øvugta. 80 prosent av teimum svensku læknalesandi í Danmark ætla sær til Svøríkis, tá teir eru lidnir við útbúgvingina.

Ugebrev A4, ið er eitt blað, sum fakligi landsfelagsskapurin í Danmark gevur út, skrivaði í gjár, at eru tey svensku tølini røtt, verður tørvur á 1.462 læknum í Danmark um tjúgu ár. Tað hevur vakt ans ímillum politikararnar. Birthe Skaarup, sum er formaður í heilsunevndini hjá Fólkatinginum, sigur, at talan er um eina vanlukku. Tað sama sigur Bent Hansen, sum er formaður í heilsunevndini hjá teimum donsku amtunum.

- Tað er vandi fyri, at læknatrotið verður ein varandi trupulleiki, sigur hann við Ugebrevet A4.